# Reglugerð fyri skipanina við Ígongdsetarastuðli

**§ 1.**

Fyritøkur við heimstaði í Vágs kommunu kunnu søkja Vágs kommunu um at veita stuðul til keyp av ráðgevingartímum hjá vinnuráðgeva, grannskoðara, sakførara ella øðrum sakkønum fólki.

*Stk. 2*

Við fyritøku verður skilt m.a. partafelag, smápartafelag, íognarfelag og sjálvstøðug vinnurekandi.

*Stk. 3.*

Stuðulin kann bara verða latin nýstovnaðum fyritøkum ella fyritøkum undir stovnan. Fyritøkur, sum hava verið virknar, men eru steðgaðar og nú vilja í gongd aftur, kunnu ikki fáa stuðul.

*Stk. 4.*

Samanlagt kann sama fyritøka í mesta lagi fáa stuðul á kr. 5000,- til keyp av ráðgevingartímum.

**§ 2.**

Stuðulin er treytaður av, at ráðgevin antin er skrásettur, ella at hann á annan hátt formliga hevur hóskandi førleikan.

*Stk. 2.*

Stuðul verður latin eftir umsókn á serstøkum umsóknarblað. Einstaki stuðulin er treytaður av, at rúmd er á tí játtan, sum kommunan árliga setur av til tiltakið.

*Stk. 3.*

Umsókn verður svarað í seinasta lagi 14 dagar eftir, at umsóknin er latin kommununi.

**§ 3.**

Í umsókknini skal í minsta lagi vera frágreiðing um:

1. Endamálið við ráðgevingini
2. Endamálið við fyritøkuni
3. Fíggjar- og rakstraræætlan
4. Yvirlit yvir eigaraviðurskifti, nevnd og stjórn.

Henda reglugerð er góðkend á býráðsfundi 21. august 2006 og hevur gildi frá 21. august 2006.